**12. juni 2008 AK/jm**

# Kunning um verkætlanir játtaðar av fiskivinnuroyndum 2008

Fiskimálaráðið hevur gjørt av at játta pening til 11 nýggjar verkætlanir av játtanini Fiskivinnuroyndir.
Harumframt er framhaldandi játtan latin 11 verkætlanum, sum eru byrjaðar í 2006[1] og 2007, sí fylgiskjal 1.

Tilsamans fáa 22 verkætlanir játtað stuðul íalt 8.464 kkr. harav 4.999 kkr. fyri 2008.

21 nýggjar og 11(+1) framhaldandi verkætlanir ella tilsamans 32(+1) verkætlanir søktu upprunaliga um tilsamans 15,6 mió. kr., harav 10,0 mió. kr. í 2007. Færri umsóknir vóru í 2008 (32+1) enn í 2007 (39), men positivt var, at fíggjarstyrkurin, sum hesar søktu frá FVR, var undir helvtina av samlaða kostnaðinum (42-43%) í 2008. Í 2007 søktu umsøkjararnir um ein reiðiliga stóran part av samlaðu fíggingina frá FVR (2/3).

Umsóknirnar hava verið viðgjørdar eftir sama leisti sum undanfarin ár, men endaliga viðgerðin hevur verið nógv seinkað, tí FVR er knýtt at árligu játtanini á fíggjarlógini, og hendan hevur verið nógv seinkað í ár. Vanliga er stýrið liðugt við innstillingarnar fyri nýggjárs. Stýrisbólkurin hevur ikki kunnað tikið endaliga støðu til verkætlanirnar fyrr enn fíggjarlógin varð endaliga samtykt av løgtinginum[2]. Mannagongdirnar fyri viðgerðini eru lýstar á heimasíðuni www.fvg.fo.

Seinnu árini hevur verið dentur lagdur á at fáa vinnufyritøkur at luttaka meira í verkætlanum. Serligur dentur var aftur í ár lagdur á at fáa verkætlanir innan ásettu 5 høvuðsøkini, men sum samstundis kundu lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar (fisk, livur, rogn innvølir vm).

Í ár hava vinnufyritøkur fingið 40% (39% í fjør) av játtanini, meðan almennir stovnar[3] hava fingið 26% (35% í fjør). Ein postDoc-verkætlan verður stuðlað á Fróðskaparsetrinum, og er hon íroknað tølini fyri almennar stovnar.




[1] Ein gongur aftur til 2005
[2] 2. og 3. viðgerð fór fram fríggjanáttina og leygarmorgunin 30.-31.mai 2008.
[3] FRS og Fróðskaparsetur Føroya

PhD verkætlanir hava fingið fjórðingin ella 25% av játtanini (móti 23% í fjør). Granskingarkjarnurnar, sum Fiskimálaráðið setti á stovn fyri knøppum 5 árum síðani, hava fingið 9% av játtanini (móti 3 % í fjør). Granskingarkjarnan fyri Biotøkni hevur síðani 1. aug. 2008 húsast á Náttúruvísindadeildini.

Samanborið við 2004-2007 sæst, at vinnufyritøkur fáa játtað 40% ella nakað minni enn helvtina av peninginum í 2008 (40% í 2008 og 39% í 2007). Mett verður, at ynskiligt hevði verið, at hesin parturin var størri í ár, so hetta var meira í tráð við tey endamál, vit hava arbeitt eftir seinnu árini. Ætlanin er at fáa hækka góðskuna á umsóknunum í 2009. Kortini ber til at siga, at góðskan á umsóknunum er nógv batnað seinastu árini, og í ár varð mett at bert ein umsókn ikki fall innan økini, sum FVR stuðlar (í fjør vóru tað 8!).

Játtanin til PhD verkætlanir og post Doc[4] er økt reiðiliga nógv. Ein vinnugranskari verður somuleiðis stuðlaður komandi 3 árini. Somuleiðis er játtanin til verkætlanir hjá teimum 3 kjarnunum (biotøkni, framleiðslutøkni og reiðskapstøkni) hækkað eitt sindur aftur í 2008.
Játtanin til aðrar "almennar stovnar", sum hækkaði eitt sindur í fjør er fallin aftur og er nú umleið fjórðingurin av játtanini.




Bert ein vinnugranskaraverkætlan verður stuðlað í løtuni. Ynskiligt er, at vinnan nýtir hendan møguleika at "slúsa" granskarar inn í virkini (FVR endurrindar 50% av kostnaðinum, tó hægst 300.000 kr. árliga í upp til 3 ár).

[4] 6 PhD og 1 PostDoc verkætlan verða stuðlaðar av Fiskivinnugransking (ofta stuðlar Granskingarráðið nakrar av hesum eisini. Somuleiðis verður 1 vinnugranskaraverkætlað stuðlað av FVR í løtuni.

## Fylgiskjal 1: Verkætlanir 2008

| Id. | Navn | | Játtað 2008 |
|---|---|---|---|
| | **Framhaldandi verkætlanir** | | **2.571.768** |
| 200601911 | DEGREE | A | 96.750 |
| 200600029 | Vistfrøðiligur-búskaparligur myndil -Fiskivinnumyndil | A | 400.000 |
| 200600030 | Gulllaksur | A | 150.000 |
| 200600031 | Kanning av koralløkjum | A | 417.000 |
| 200600034 | Stórmeskaðum flótitrolum -(PhD) | PhD | 95.000 |
| 200600861 | Árinskanningar skjeljar | V | 305.000 |
| 200600038 | Góðskumeting av ráfiski | V | 220.000 |
| 200600033 | Collagen and Gelantin from Faroese Fish (PhD) | PhD | 300.000 |
| 200600881 | Heilsuárin av sjómati (PhD) | PhD | 80.000 |
| 200601891 | Sustainable managment (PhD) | PhD | 250.000 |
| 200601897 | Sjóstøðu ávaringarskipan (PostDoc) | pD | 258.018 |
| | **Nýggjar verkætlanir** | | **2.427.270** |
| 200700669 | Snurriváð | V | 220.000 |
| 200700681 | Gagnnýtsla av innvølum | V | 250.000 |
| 200700670 | Svartkjaftarist | V | 180.000 |
| 200700673 | Kongafiskatrol | V | 100.000 |
| 200700676 | Sandeel on the Faroe Shelf (ætlandi PhD) | PhD | 437.270 |
| 200700692 | DNTS | V | 500.000 |
| 200700690 | Livandi Upsi | G | 360.000 |
| 200700684 | Veiðudagbók | V | 100.000 |
| 200700674 | PBP-Fra peptoner til Bioaktive Peptider (Vinnugranskar) | V | 100.000 |
| 200700687 | Livratøka | G | 100000 |
| 200700685 | Góðskuoptimering trolfiskur (PhD) | PhD | 80000 |

DEGREE: Development of fishing Gears with Reduced Effects on the Enviroment
DNTS: Digital National Traceability System

Styttingar:
V: Vinnuverkætlanir
Phd: PhD-verkætlanir.
pD: Post Doc-verkætlan (er her íroknað almennar verkætlanir)
G: Granskingarkjarnurnar (biotøkni, framleiðslutøkni og reiðsskapstøkni)
A: Almennar verkætlanir

| Býtið í kr. | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Vinnufyritøkur | 2.045.005 | 2424500 | 2.185.100 | 1.975.000 | 1.975.000 |
| PhD | | 378.000 | 800.000 | 1.139.000 | 1.242.270 |
| Granskingarkjarnurnar | 481.250 | 450.000 | 641.000 | 150.000 | 460.000 |
| Almennir stovnar (íroknað PostDoc) | 2.453.750 | 1.772.000 | 1.377.000 | 1.737.768 | 1.321.768 |
| Tilsamans | 4.980.005 | 5.024.500 | 5003100 | 5.001.768 | 4.999.038 |

Fiskimálaráðið

FISKIVINNU GRANSKING

**Fiskivinnuroyndir 2008**

**Lýsing eftir umsóknum**

Fiskivinnuroyndir er játtan hjá Fiskimálaráðnum, sum stuðlar gransking og menning innan fiskivinnu:

Verkætlanir innan fylgjandi høvuðsøki hava fyrimun:

- Fiskiskapur við ábyrgd
- Royndarveiða, framleiðsla og søla
- Virðisøking av fiski
- Búskaparlig og samfelagslig menning av fiskivinnuni
- Heilsa, trygd og umhvørvi

Innanfyri høvuðsøkini verður aftur í ár lagdur dentur á at fáa verkætlanir, sum kunnu:

- Lýsa og loysa praktiskar trupulleikar at fáa alla veiðu til høldar (fisk, livur, rogn innvølir vm.).

Serligur dentur verður lagdur á, at

- vinnan tekur lut í verkætlanini
- eginfígging ella onnur fígging er verulig
- samstarv er við samstarvsfelagar í Føroyum og/ella uttanlands.

Fyritøkur, almennir stovnar og einstaklingar kunnu søkja um stuðul úr Fiskivinnuroyndum.

Víst verður á, at møguleiki er hjá vinnuni at søkja um stuðul til setan av vinnugranskara innanfyri omanfyrinevndu økir.

Um tørvur er á at orða hugskot til ítøkiligar verkætlanir ber til at seta seg í samband við samskiparan um hetta.

Umsóknir skulu verða samskiparanum í fiskivinnugransking í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. okt. 2007 kl. 12.00.

**Meira fæst at vita:**
Programm, umsóknarbløð, vegleiðingar og annað kunnandi tilfar fæst á heimasíðu okkara www.fvg.fo

Áhugaði eru vælkomin at venda sær til Jákup Mørkøre, samskipara við møguligum spurningum.

Fyrivarni verður tikið fyri játtan á løgtingsins fíggjarlóg fyri 2008.

Jákup Mørkøre, samskipari
tlf.: 35 30 30 / 35 32 48
fartel.: 55 32 48 (fyrr 21 73 69)
t-post: jakupmo@fisk.fo

Umsóknir skulu sendast til:
Fiskimálaráðið
Samskiparin í fiskivinnugransking
P.O.Box 347
Heykavegur 6
FO-110 Tórshavn